**Íslendskt og enskt í talgildum sambýli:**
**Fyrstu niðurstøðurnar frá eini meginverkætlan**

Sigríður Sigurjónsdóttir
Háskóla Íslands

Rannsóknasjóður Íslands (RANNÍS) læt á vári 2016 trý ára høvuðsstyrk til verkætlanina *Greining á málfræðilegum afleiðingum stafræns málsambýlis (Greining av málfrøðiligu avleiðingunum av talgildum málsambýli)* (www.molicodilaco.hi.is), Sigríður Sigurjónsdóttir og Eiríkur Rögnvaldsson, professarar við Háskóla Íslands eru verkætlanarstjórar. Í hesum fyrilestrinum fer Sigríður at kunna um endamálini við verkætlanini, støðu málsins í dag og geva yvirlit yvir meginniðurstøðurnar, sum longu nú kunnu leggjast fram.
Snildtólakollveltingin seinastu árini hevur ført økta ensknýtslu við sær um allan heimin og í verkætlanini er íslendskt nýtt sum dømi um eitt mál, sum er undir øktum trýsti vegna meiri ensknýtslu í kjalarvørrinum av samfelagsbroytingunum undanfarnu árini. Høvuðsendamálið við verkætlanini er at kanna ávirkanina av talgildum miðlum og snildtólum, sum vanliga bjóða upp á samvirkið samskifti við brúkarar á enskum, á málumhvørvi, málkunnleika og málnýtslu hjá íslendingum og á støðuna og framtíðina hjá íslendska málinum. Roynt verður at koma fram til, hvussu nógvur málsligur ágangur er á málbrúkararnar, bæði á íslendskum og enskum, orðfeingið og úttalan hjá luttakarunum á báðum málum eru kannað og teir eru bidnir um at meta um ymiskar setningar bæði á íslendskum og enskum. Við hesum sæst um øktur enskur málágangur í íslendska málsamfelagnum seinastu árini longu nú hevur elvt til broytingar í íslendskum og/ella sett ferð á málbroytingar sum longu vóru byrjaðar áðrenn snildtólakollveltingina.

Hesir tættir eru kannaðir við umfatandi kanning á netinum, sum skal geva yvirlit yvir 1) nýtsluna av íslendskum og enskum í íslendska málsamfelagnum, 2) málkunnleikan í íslendskum og enskum og 3) áskoðanir til málini bæði. Kanningin varð send til 5.000 samfelagsbúskaparliga tilvildarligt úrvaldar íslendingar í aldrinum 3–98 ár (svarlutfall: 41%–50% eftir aldursbólkum). Harumframt eru samrøður gjørdar og serstakar royndir lagdar fyri 230 fólk, sum eru vald úr fyrrnevnda bólkinum. Niðurstøðurnar, sum longu nú kunnu gerast úr verkætlanini benda á, at týðiligur munur sæst eftir aldri á luttakarunum í flest øllum spurningum, sum kannaðir eru. Til dømis kann nevnast, at niðurstøður okkara vísa, at børnini er alt yngri tá tey byrja at nýta snildtól av ymsum slagi og í yngsta aldursbólkinum (3–5 ár) vóru 8% av børnunum byrjað at nýta snildtól, áðrenn tey vóru ársgomul. Børn í dag hoyra eisini frá ungum aldri almikið av talaðum enskum, og samanburður við eldri kanningar bendir á, at teirra virkna ensknýtsla er økt. Til endans eru ábendingar í okkara dátum um, at teir luttakarar, sum hava nógv enskt í málumhvørvi sínum og nýta nógv enskt, meira sannlíkt tosa enskt uttan íslendskan aksent, góðtaka nýgerðir í málløruni, sum ikki samtykkja við málhevdina, t.d. hvussu søguháttur og hugsháttur verða nýtt, og hava jaligari áskoðan á virkna ensktnýtslu. Eingin ivi er um, at áhaldandi greining og viðgerð av dátunum, sum eru tøkar, og teimum, ið nú verða savnaðar, fara at gera mangt greiðari viðvíkjandi støðuni hjá íslendska málinum og framtíðarútlitinum fyri málið.

**Sigríður Sigurjónsdóttir** er professari í íslendskari málfrøði á Deildini fyri íslenskt og mentan á Háskóla Íslands. Hon leyk ph.d.-prógv frá Kaliforniauniversitetinum í Los Angeles (UCLA) árið 1992 og hevur starvast við Háskóla Íslands í eina fjórðingsøld ella síðani 1994. Serøki hennara eru barnamáltøka og málbroytingar í íslendskum nútíðarmáli, og á teimum økjunum hevur hon skrivað fjølmangar javnlíkamettar greinar.